# Russar spenna vøddar í póløkinum

**Fyri fjúrtan døgum síðani vóru londini við Norðpólin á einum máli um at øll viðurskifti í økinum skuldu avgreiðast í sátt og semju við samráðingum. Kortini senda russar hermenn úr luftini niður á pólin, samstundis sum kanadiumenn senda ein kavbát eftir botni**

Árni Joensen

Leygardagin verða russiskir fallskíggjahermenn sleptir niður yvir Norðpólin. Alment verður sagt, at hendingin hevur samband við, at 51 ár eru liðin, síðani russiskir granskarar fóru at kanna tað arktiska økið. Men nógvir eygleiðarar halda, at tað veruliga endamálið við tiltakinum er ein ávaring um, at Russland vil hava eina avgerð um, hvussu náttúrutilfeingið í Arktis skal býtast, og at landið er til reiðar at brúka sína hermegi til at staðfesta síni rættindi.

Tá umboð fyri USA, Russland, Kanada, Noreg og Danmark hittust í Kanada herfyri at tosa um viðurskiftini í Arktis, søgdu tey seg vera samd um at loysa allar møguligar trætur við samráðingum. Men sambært keldum hjá danska blaðnum Politiken var tað júst ein russisk hóttan um at brúka hervald, sum fekk kanadisku stjórnina at boða hinum á fund.

Tey fimm londini hava lagt síni krøv á borðið hjá ST, men á fundinum í Kanada vóru tey á einum máli um, at viðgerðin í ST gongur ov seint. Sambært danska umboðnum, løgmálaráðharranum Lars Barfoed, kann viðgerðin í ST taka meiri enn 30 ár og í ringasta føri eina hálva øld.

## Ovurstórt ríkidømi

Londini, sum hava rættindi í póløkinum, hava eisini nógv at stríðast um. Geological Survey hevur fyrr mett, at umleið 90 milliardir tunnur av olju eru í økinum norðan fyri pólringin. Tað er nóg mikið til at nøkta allan oljutørvin í heiminum í trý ár. Harafturat koma umleið 47.000 rúmmetrar av náttúrgassi og 44 milliardir tunnur av flótandi nátúrgassi. Tað er næstan ein triðingur av øllum teimum kendu goymslunum í heiminum.

Sostatt er tað eitt ovurstórt ríkidømi, sum londini stríðast um. Ein partur av oljuni undir havbotninum er so nær landi, at tað er longu greitt, hvør eigur hana. Men verri verður tað, tá londini skulu semjast um, hvørt teirra skal hava oljuna og gassið á teimum leiðum, har landgrunnarnir hjá tveimum ella fleiri londum ganga um hvør annan. Tí spurninginum skal ein vísindalig nevnd hjá ST svara, men tað er hendan nevndin, sum sambært teimum fimm londunum arbeiðir ov seint. Tí samdust londini á fundinum herfyri um at seta egnar embætismenn at kanna, hvussu meiri ferð kann koma á málið. Tey vóru eisini samd um, at mál, sum tey ikki kunnu loysa, skulu leggjast fyri altjóða dómstólin í Haag.




*Veðurlagsbroytingar hava gjørt tað lættari at sigla báðumegin pólin og givið lættari atgongd til náttúrutilfeingið*

Mynd: Aftenposten

## Eingin eigur pólin

Sostatt var semja um at loysa allar trætur við samráðingarborðið, men kortini hevur Russland meiri enn eina ferð spælt við teimum hernaðarligu vøddunum í tí arktiska økinum.

– Russland fer uttan himpr at tryggja sær síni rættindi í Arktis, segði Dmitri Medvedev, forseti, stutt undan fundinum í Kanada, og kanska er tað ein ávaring ella í hvussu er ábending, tá russiskir fallskíggjahermenn dala niður á Norðpólin leygardagin.

Russiska tiltakið hevur eisini vakt ans. Kanadiski uttanríkisráðharrin, Lawrence Cannon, segði fyrr í vikuni, at rusiska tiltakið við fallskíggjahermonnunum er ikki annað enn propaganda, og at tað fær onga ávirkan á tann kanadiska yvirvaldsrættin í økinum.

– Í mong ár eru fólk farin niðan á Mount Everest at seta sítt flagg á tindin. Tað hevur ongan týdning. Eingin eigur Norðpólin. Vit hava gjørt av at gera nakrar vísindaligar kanningar við einum kavbáti heldur enn at spæla uppi í luftini, segði Lawrence Cannon millum annað við Canadian Press.

## Kleist atfinningarsamur

Grønlendski landsstýrisformaðurin, Kuupik Kleist, heldur lítið um, at russar sleppa fallskíggjahermonnum niður á Norpólin. Hann er samdur við kanadiska uttanríkisráðahrranum og kallar russisku framferðina ein toruleik. Russar brúktu hel2dur ikki tann rætta framferðarháttin, tá teir fyri trimum árum síðani settu russiska flaggið á havbotnin á Norðpólinum, sigur Kuupik Kleist við KNR.

Grønlendski landsstýrisformaðurin er heldur ikki serliga hugtikin av, hvussu Danmark ogKanada bóru seg at í trætuni um ta lítlu Hans Ø, sum er millum Grønland og Kanada. Londini skiftust um at seta flagg á oynna og at senda herskip hagar, men slík framferð sømir seg ikki londum sum Danmark og Kanada, heldur Kuupik Kleist. Hann ásannar tó, at tað er neyðugt at halda eyga við, hvat londini við áhuga í økinum gera, men vónar, at allir partar lata skil og vit ráða.

arni@sosialurin.fo



*Kuupik Kleist hartar Danmark og Kanada fyri stríðið teirra millum um ta lítlu Hans Ø*

Mynd: KNR



*Kanadiski uttanríkisráðharrin, Lawernce Cannon: – Russiski luftleikurin fær onga ávirkan*